# Av tekjuni niður í urtagarð



*– Vit ætla at bjóða fram eitt tilboð til fólk, sum fevnir um snøgt sagt øll smærri arbeiði innanveggja og uttanfyri: Bæði máling, velting, elarbeiði, tapetsering, og at stoypa flísar og síðani leggja tær á, sigur Mortan Justesen av Morskranesi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Eitt nýtt felag bjóðar seg fram at gera smærri arbeiðir innanveggja og uttanveggja hjá fólki. – Vit ætla at gera smærri arbeiðir fyri fólk - úr urtagarðinum og heilt upp á tekjuna, sigur Mortan Justesen á Morskranesi, sum stendur aftanfyri "Húsa- og Garðsrøkt"**

VINNUMØGULEIKAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Morskranes:** Tú kennir støðuna: Tú eigur eini hús og teimum tørvar smærri ábøtur. Hvørki tú, ella nakar annar í nánd av tær, kann gera hetta.

Tú leitar eftir einum handverkara, men tað ber honum ikki til at gera hetta: Annaðhvørt tímir hann ikki so væl, ella hevur hann úr at gera við øðrum og kanska meiri spennandi uppgávum.

Samstundis stendur tú og hyggur eftir, meðan húsini standa og rópa eftir eini ábót, - ein ábót, sum kann gerast kostnaðarmikil, um arbeiðið ikki verður gjørt rættiliga skjótt.

Ella – tú eigur ein stóran urtagarð, sum einaferð var vakur og alt angaði av nýslignum grasi og føgrum blómum. Nú er styrkin og áhugin hjá tær ikki hin sami, og ókrútið sær út til at gera sær dælt av hesi støðuni.

Hvat er til ráða at taka? Hvønn skalt tú venda tær til at gera hesa einu uppgávuna, ella at røkja urtagarðin alt árið?

Tað vóru júst hesir somu spurningarnir, sum komu til virkisfúsa Mortan Justesen á Morskranesi. Og hann ynskti at gera nakað við tað.

Hann hevði nevniliga sæð tørvin hjá so mongum øðrum, og ynskti nú at bjóða fram eina tænastu sum eitt slag av húsavørði fyri fólk, fyritøkur og feløg.

Felag hansara kallast "Húsa- og Garðsrøkt", og fer í næstum undir virksemið sítt kring alt landið.

## Áhugi kring alt landið

Nú Mortan er til reiðar við tænastu síni, ynskir hann ikki á nakran hátt at leypa framav. Alt verður byrjað við varsemi.

Hann kennir nógv fólk, og hann hevur eisini sagt teimum frá hesi nýggju tænastuni, sum eisini umfatar tær flísarnar, hann sjálvir stoypir á Morkranesi.

Hann hevur ikki enn lýst stórvegis um ætlanirnar hjá